# Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags

Skrás. nr. 3000

Ársfrásøgn fyri
2018

Framløgdur og góðkendur á ársaðalfundi 30/4-19

Fundarstjóri: JÓHAN LAMHAUGE

# Innihaldsyvirlit

| | |
|---|---|
| Upplýsingar um grunnin | 2 |
| Høvuðs- og lyklatøl | 3 |
| Leiðslufrágreiðing | 4 |
| Roknskaparátekning leiðslunnar | 11 |
| Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara | 12 |
| Nýttar roknskaparreglur | 15 |
| Rakstrarúrslit fyri tíðarskeiðið 1. januar - 31. desember | 19 |
| Fíggjarstøða 31. desember | 20 |
| Notur | 22 |

# Upplýsingar um grunnin

Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags
Stoffalág 60
FO-100 Tórshavn

Telefon 35 48 00
Telefaks 35 48 01

Skrásetingar nr.: 3000

Heimstaður: Tórshavn

## Nevnd:
Sofus Joensen, formaður
Eli Brimsvík, næstformaður
Jóhan J. Lamhauge
Jan Otto S. Holm
Dánial Pauli Djurhuus

## Stjórn:
Petur Juul Jacobsen

## Ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingur:
Steen Ragn, cand. act.

## Grannskoðari:
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

## Peningastovnar:
P/F BankNordik
P/F Betri Banki

# Høvuðs- og lyklatøl

| Høvuðstøl í tkr. | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| Eftirlønargjøld | 28.765 | 24.595 | 22.639 | 23.839 | 24.044 |
| Tryggingarveitingar | -6.351 | -5.180 | -4.224 | -2.482 | -3.685 |
| Úrslit av íløguvirksemi | -17.175 | 8.526 | 5.009 | 7.803 | 9.990 |
| Rakstrarkostnaðir av eftirlønarvirksemi | -1.848 | -1.876 | -1.697 | -1.709 | -1.616 |
| Eftirlønartekniskt úrslit | -428 | -1.538 | -3.006 | 4.542 | -5.924 |
| Ársins úrslit | -776 | -1.315 | -2.816 | 4.728 | -5.421 |
| Limakontur | 28.108 | 27.635 | 250.821 | 229.620 | 202.879 |
| Eftirlønaravsetingar | 303.394 | 299.701 | 49.135 | 45.791 | 49.812 |
| Eginogn til samans | 5.983 | 6.760 | 8.075 | 10.891 | 6.163 |
| Ogn til samans | 346.326 | 342.561 | 316.826 | 293.241 | 266.355 |

**Lyklatøl**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Avkast av íløguvirksemi | -4,9% | 2,6% | 1,7% | 2,9% | 4,1% |
| Kostnaður í prosent av eftirlønargjøldum | 6,4% | 7,6% | 7,5% | 7,2% | 6,7% |
| Kostnaður í prosent av avsetingum | 0,6% | 1,1% | 3,6% | 3,6% | 3,7% |
| Kostnaður fyri hvønn limin | 485 kr. | 526 kr. | 509 kr. | 510 kr. | 502 kr. |
| Kostnaðarúrslit | 0,01% | 0,02% | -0,11% | 0,00% | -0,23% |
| Eginpeningsstig | 4% | 4% | 27% | 35% | 22% |
| Solvensdekningur | 141% | 152% | 1015% | 944% | 823% |
| Yvirdekningur | 3,78% | 4,47% | 485% | 479% | 378% |
| Renting av eginogn | -12% | -18% | -30% | 55% | -61% |

# Leiðslufrágreiðing

## Endamál grunsins

Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags hevur til endamáls at reka eftirlønarvirksemi sambært viðtøkunum fyri grunnin. Grunnurin er sjálveigandi stovnur.

## Virksemi hjá grunninum

Høvuðsvirksemi hjá grunninum er at umsita eftirlønir hjá limum í Havnar Handverkarafelag og limum í øðrum handverkarafeløgum.

## Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftunum hjá grunninum

*Tryggingarvirksemi*

Í 2018 vóru eftirlønargjøldini umleið 32,9 mió. kr. í mun til 28,4 mió. kr. í 2017, sí notu 1. Talan er um eina hækking á 4,5 mió. kr., ella 15%. Í veruleikanum er talan um eina lutfalsliga minni hækking í inngjøldunum, tá hædd verður tikin fyri, at lønin hækkaði 1. oktober 2018. Eftirlønargjøldini stava frá handverkaravinnuni. Á summum økjum hevur verið stór framgongd, eisini hjá fyritøkum, sum hava virksemi uttanlands. Hetta sæst eisini aftur í eftirlønargjøldunum. Talið av tryggingartakarum er eisini ávirkað av tí sama. Inngjøldini til og við 2011 eru býtt á lívrentu, kapital- og lutaeftirløn. Frá og við 2012 verða inngjøldini viðgjørd sambært nýggju eftirlønarlógini.

Nýggja eftirlønarlógin heimilar, at í mesta lagi ein triðingur av eftirlønarinngjøldunum kann nýtast til keyp av tryggingum. Eftirlønarinngjøldini til grunnin eru fyri limir í fimm fakfeløgum. Hesi fimm feløgini hava tryggingaravtalu við tryggingarfelag fyri sínar limir. Feløgini hava gjørt av, at gjaldið fyri tryggingina skal takast av eftirlønarinngjøldunum. Grunnurin tekur gjaldið fyri tryggingina av inngjaldinum og avroknar við Havnar Handverkarafelag, sum stendur fyri tryggingini. Gjaldið verður einans tikið av, um tað er í tráð við ásetingarnar í eftirlønarlógini, og um peningur er til tað. Grunnurin hevur einki við sjálva tryggingina ella tryggingaravtaluna at gera, og er tí leysur av allari ábyrgd.

Í 2018 vóru eftirlønarveitingarnar umleið 6,3 mió.kr. í mun til umleið 5,2 mió.kr. í 2017, sí notu 4. Hetta svarar til eina øking á umleið 1,1 mió.kr. Eftirlønarveitingarnar kunnu býtast millum útgjaldingar í samband við, at tryggingartíðin er úti, afturkeyp av tryggingum og deyða.

Eftirlønaravsetingarnar eru 303,3 mió.kr. Við ársbyrjan 2018 vóru hesar umleið 299,7 mió.kr. Sostatt er talan um eina hækking á 3,6 mió.kr. Limakontur telja ikki longur við í grundarfæfeinginum við fullari upphædd (sí niðanfyri). Hetta varð broytt í 2017. Eftir ávísing frá Tryggingareftirlitinum er tað, sum higartil hevur verið limakontur, broytt til pensjónskontur og 10% av hesum kunnu verða limakontur. Tey 90% verða so løgd undir eftirlønaravsetingar. Kravið er, at í mesta lagi 5% av pensjónskontunum kunnu verða limakontur, men grunnurin væntar, at tilber at koma frá 10% til 5% innan ársenda 2023. Tær 303,3 mió.kr. viðvíkja soleiðis avsetingum til solidariska skipan og pensjónskontur.

*Fíggjarliga virksemi*

Gongdin á fíggjarmarknaðunum í 2018 hevur verið vánalig.

Samlaðu fíggjarinntøkurnar eftir fyrisitingarkostnað av íløguvirksemi vóru umleið -17,1 mió.kr. Samlaðu fíggjarinntøkurnar fyri 2017 vóru umleið 8,5 mió.kr, sí notu 2 og 3. Lánsbrøvini hava í 2018 givið rímuligt avkast. Gongdin við partabrøvunum hevur verið vánalig. Við øðrum virðisbrøvum hevur gongdin verið hampilig.

# Leiðslufrágreiðing

Í høvuðsheitum eru íløgur grunsins gjørdar í lánsbrøv, men eisini í partabrøv og onnur virðisbrøv. Umleið 59% av íløgunum eru í lánsbrøvum. Grunnurin hevur tann íløgupolitikk, at íløgurnar skulu spjaðast á ein hóskandi hátt, soleiðis at váðin verður avmarkaður, og eitt nøktandi avkast kann náast.

Samlaðu ognirnar eru nú 346 mió.kr. samanborið við 342 mió.kr. í 2017.

Grunnurin leggur stóran dent á, at stór krøv verða sett til, hvussu tann ílagdi peningurin verður umsitin, og hvørji etisk krøv verða sett í hesum sambandi. Hetta er eisini ein partur av avtalum grunsins við teir eftirlønarveitarar, grunnurin nýtir. Hesi viðurskifti verða javnan viðgjørd og eftirmett.

Rakstrarútreiðslurnar hjá grunninum fyri 2018 vórðu umleið 1,9 mió.kr., sum er áleið tað sama sum í 2017.

Rakstrarúrslitið er eitt hall á umleið 0,8 mió.kr. Úrslitið er ávirkað av avsetingum til solidarisku eftirlønirnar, eisini sæð í mun til væntaninar í seinastu leiðslufrágreiðing.

Eginognin hjá grunninum við árslok 2018 var umleið 5,9 mió.kr.

## Kapitalstyrki

Kapitalstyrki grunnsins í mun til sínar tryggingarligu skyldur:

| tkr. | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginogn | 5.983 | 6.760 | 8.075 | 10.891 | 6.163 |
| Limakonti | 28.108 | 27.635 | 250.821 | 229.621 | 202.879 |
| Ábyrgdarlán | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| Grundarfæfeingi | 39.091 | 39.395 | 263.896 | 245.512 | 214.042 |
| Fæfeingiskrav | 27.629 | 26.057 | 26.000 | 26.000 | 26.000 |
| Kapitalstyrki | 11.462 | 13.338 | 237.896 | 219.512 | 188.042 |

Í sambandi við omanfyri standandi uppseting kann leggjast afturat, at fæfeingiskravið í 2018 er hækkað til 3,7 mió. evrur. Í krónum merkir hetta, at kravið er hækkað til áleið 27 mió.kr. Fæfeingiskravið er hækkað í sambandi við broyting í lógini um tryggingarvirksemi. Individuelli solvenstørvurin varð við ársenda 2018 uppgjørdur til 18,8 mió. kr. Sí eisini notu 12 og 13.

## Stýring av váða

Grunnurin hevur í dag góðar mannagongdir fyri at stýra váðanum. Nevndin hevur ábyrgd av karmunum fyri stýring av váðum í grunninum, meðan dagliga leiðslan leypandi heldur eyga við, at karmarnir verða hildnir. Grunnurin er í høvuðsheitum ávirkaður av hesum váðum:

- Fíggjarligir váðar
- Tryggingarligir váðar
- Operationellir váðar
- Handilsligir váðar

# Leiðslufrágreiðing

## Fíggjarligir váðar

Fíggjarligir váðar kunnu flokkast í

- Marknaðarváða
- Gjaldførisváða
- Mótpartsváða
- Spjaðingarváða

Marknaðarváðin er váðin fyri, at dagsvirðið á aktivunum ella skyldunum hjá grunninum broytast vegna broytt marknaðarviðurskifti so sum rentu, kursir o.a. Ein lýsing av hesum sæst millum annað í notu 11 um viðkvæmisupplýsingar. Her verður eitt nú víst á, hvørja minstaávirkan ein rentuhækking, ávikavist ein rentulækking á 0,7% hevur á grundarfæfeingið. Grunnurin hevur ein rættiliga stóran part av sínum íløgum í lánsbrøvum. Tí verður ansað væl eftir, hvussu hesi eru samansett í mun til støðuna á marknaðinum, eitt nú við varigheit og øðrum.

Gjaldførisváðin er váðin fyri at staðfesta tap vegna at skula frígeva gjaldføri fyri at kunna rinda sínar skyldur innan stuttan tíðarkarm.

Mótpartsváðin er váðin fyri tapi vegna tess, at mótpartar ikki halda sínar skyldur.

Spjaðingarváðin. Vantandi spjaðing kann føra við sær tap, um íløgur í ov stóran mun eru bundnar í ávísar vinnur ella marknaðir o.s.fr.

Fyri grunnin er marknaðarváðin nógv tann stórsti fíggjarligi váðin. Hesin váði verður avmarkaður við at tryggja hóskandi karmar fyri rentuváðan fyri lánsbrøv. Hetta saman við eini varnari íløgustevnu fyri partabrøv og onnur virðisbrøv. Fyri grunnin er tað av stórum týdningi, at marknaðarváðin er undir neyvum og støðugum eftirliti.

Í notu 11 um viðkvæmisupplýsingar verður víst á, hvør minsta ávirkan er á grundarfæfeingi, um partabrævakursirnir falla 12%. Ávirkanin er -10 mió.kr. Hetta er í mun til, hvussu stórur partur av verandi í løgum er í partabrøvum. Størri hesin partur er, størri er váðin, og minni hesin partur er, minni er váðin. Talan er sostatt um viðurskifti, sum kunnu hava stóra ávirkan á eginognina, sum í løtuni er 6 mió.kr. Sum nevnt frammanfyri hevur gongdin við partabrøvunum í 2018 ikki verið góð.

Sum fyrr nevnt hevur grunnurin ein lutfalsliga stóran part av íløgunum í lánsbrøvum. Gongdin í rentunum hevur sín týdning fyri úrslitið og fyri rentuváðan, eisini fyri framtíðina. Hækka renturnar, er vandi fyri ávísum kursfalli. Í neyvum samstarvi við íløguveitararnar verður hesin váðin avmarkaður mest møguligt við røttu samansetingini av lánsbrøvunum og í ávísan mun í býtinum millum lánsbrøv og onnur virðisbrøv. Leggjast kann afturat, at gongdin við lánsbrøvum ofta er meira varlig og líðandi í mun til eitt nú partabrøv, har sveiggini kunnu henda skjótt og ógvisliga. Tí er tað av alstórum týdningi at hava eina íløgustevnu, sum í mest møguligan mun tekur hædd fyri hesum.

Gjaldførisváðin verður avmarkaður við at hava munandi partar av íløgunum í likvidum, børsskrásettum virðisbrøvum eins og ein hóskandi part í tøkum peningi.

# Leiðslufrágreiðing

Mótpartsváðin verður avmarkaður við, at ein sera stórur partur av íløgunum er settur í stats- og realkredittlánsbrøv við høgari rating. Eisini verður dentur lagdur á, at samstarva við íløgurøktarar við drúgvum royndum.

Spjaðingarváðin verður avmarkaður við at spjaða íløgur grunnsins í ymsar vinnur og marknaðir og við at avmarka íløgur í sama útskrivara. Eisini við íløgum í íløguprógv við góðari spjaðing í undirliggjandi aktivum.

Omanfyri nevndu váðar eru partur av solvensuppgerðini fyri grunnin, og eru soleiðis undir støðugum eftirliti á tann hátt. Sum nevnt omanfyri er marknaðarváðin størsti váðin.

## Tryggingarligir váðar

Teir tryggingarligu váðarnir kunnu flokkast í

- Livitíð
- Deyðstíttleika
- Avlamnistíttleika
- Spjaðing

Teir tryggingarligu váðarnir viðvíkja gongdini í deyðstíttleika, avlamnistíttleika, hættisligari sjúku v.m. T.d. økir hækkandi livialdur veitingarnar til eftirlønir, meðan talið av andlátum og sjúkrameldingum ávirkar veitingar vegna deyða og sjúku. Mest týðandi váðin er livialdur. Í notu 11 um viðkvæmisupplýsingar verður upplýst, hvørja ávirkan eitt 10% fall og hækking í deyðatali hevur á bonusmøguleikar vm.

Spjaðingarváði í.s.v. tryggingarligar váðar umfatar vandan fyri tapi vegna stóra eksponering til einstakar kundabólkar og einstakar persónar.

Sum nevnt frammanfyri undir lýsing av gongdini í árinum, eru eftirlønaravsetingarnar gjørdar upp til 303,3 mió.kr. Tá ið avsetingarnar verða gjørdar upp, verður millum annað 10-ára rentan, sum danska Fíggjareftirlitið kunnger dagliga, nýtt. Við ársenda 2018 var hendan renta 1,1%. Høg renta hevur við sær lægri avseting og harvið positiva ávirkan á eginognina. Lág renta hevur við sær hægri avseting og harvið negativa ávirkan á eginognina. Við ársbyrjan var eftirlønaravsetingin gjørd upp til 299,7 mió.kr., og 10-ára renta var tá 1,1%.

## Operationellir váðar

Grunnurin kann koma út fyri fíggjarligum tapum vegna operationellan váða, ella hesin kann skaða umdømi grunnsins. Operationellir váðar umfata váða fyri tapi vegna feilir í KT-skipanum, løgføðisligum ósemjum, ikki nøktandi ella skeivum mannagongdum ella sviki. Grunnurin avmarkar operationellan váða við innaneftirliti og funktiónsskilnaði, sum leypandi verða endurskoðað og dagførd.

# Leiðslufrágreiðing

## Annað

Fyri teir váðar, sum eru lýstir omanfyri, kann sigast, at hesir eru ein grundleggjandi partur í sambandi við uppgerð av individuella solvenstørvi grunnsins. Av tí sama verður hildið eitt vakið eyga við hesum váðum. Fastar mannagongdir eru fyri, hvussu farast skal fram í sambandi við at váðarnir broytast. Her verður eitt nú hugsað um viðkomandi tiltøk, eins og fráboðan til nevnd o.a. Bæði kapitalplanur og kapitalneyðplanur eru eisini sjálvsagdur partur av skjalfestingini fyri solvensuppgerðini.

## Vitanarstøði

Fyri grunnin hevur tað alstóran týdning at starvsfólkini hava gott vitanarstøði. Dentur verður lagdur á, at starvsfólkini hava viðkomandi útbúgving og eftirútbúgving fyri at hava neyðugu førleikarnar at røkja uppgávurnar, sum standast av virksemi grunnsins.

## Rakstur og skipanir v.m.

Grunnurin leggur stóran dent á, at dagligi raksturin er skipaður í tryggum og góðum umhvørvi. Viðvíkjandi teimum skipanum, sum nýttar verða, verður stórur dentur lagdur á rakstrartrygdina. Hýsing- og rakstraravtalur eru gjørdar, har hædd er tikin fyri teimum krøvum, sum grunnurin setur til trygd v.m. Menning v.m. av skipanum er hjá uttanhýsis veitara. Alt hetta verður gjørt fyri at tryggja framhaldandi menning av rakstrarumhvørvinum.

## Mannagongdir vm.

Sum partur av virksemi grunsins eru mannagongdir og leiðreglur vm. settar í gildi. Neyvt eftirlit er við, at hesar verða hildnar. Millum annað hesi viðurskifti kunnu nevnast:

- Leiðreglur fyri arbeiðsbýti millum nevnd og stjórn.
- Mannagongdir á øllum týðandi økjum.
- Forboð fyri at reka sjálvstøðugt vinnuvirki.
- Víðarilating av upplýsingum.
- Skjalprógv um at gera upp individuellan solvenstørv.
- Leiðreglur um at skráseta ognir og mannagongdir fyri hvussu skráin verður førd.
- Leiðreglur um forboð móti hvítvasking.

Virksemi grunnsins er avmarkað og fyrisitingin av tí sama ikki so stór. Eftir besta førimuni verður roynt at hava greiðan skilna í millum tær uppgávur, persónarnir røkja. Nevndin hevur evstu ábyrgd av virksemi og rakstri grunnsins og hevur soleiðis eisini eina eftirlitsskyldu. Og hetta verður eisini gjørt. Eisini er soleiðis skipað fyri í leiðreglunum, at kunning og frágreiðing til eitt nú nevndina er ein fastur og intigreraður partur í so máta. Í summum førum er beinleiðis ásett, at ábyrgdarpersónar skulu útnevnast at standa fyri kunning vm. til nevndina. Eftirlit verður eisini framt við stakroyndum, gjøgnumgongd, umrøðu, samrøðum og fyrispurningum vm. Eisini skulu persónar í ávísum førum geva nevndini frágreiðingar og um neyðugt eisini útgreiningar. Ein partur av eftirlitinum er eisini, at uppgerðir og annað skulu leggjast fyri nevndina til gjøgnumgongd og góðkenning. Fyri at tryggja, at leiðreglur vm. verða umsitin so rætt sum til ber, verður javnan skipað fyri kunning og framløgum vm. Eftirmeting og dagføring av reglunum er eisini ein partur av tí at tryggja góðar umstøður til eftirlit. Hesar eftirmetingar verða gjørdar hvørt ár eftir skipaðum reglum. Leiðreglur, mannagongdir, reglugerðir, vegleiðingar v.m., eins og yvirskipaður politikkur verður eftirmett. Staðfest verður, um neyðugt er við broytingum og dagføringum. Á hendan hátt

# Leiðslufrágreiðing

verður syrgt fyri, at leiðreglur v.m. fylgja ásetingum og lógarkrøvum, og at eftirlit er við hesum í sambandi við dagliga virksemi.

## Individuelli solvenstørvurin

Individuelli solvenstørvurin er ein uppgerð um tað kapitalkrav, sum grunnurin hevur. Hetta verður gjørt við støði í teimum váðum, sum grunnurin hevur. Grunnurin velur uppgerðarháttin fyri solvenstørvin, og hesin skal taka støði í øllum týðandi váðum. Í minsta lagi árliga skal nevndin eyðmerkja og viðgera allar týðandi váðar hjá grunninum. Hetta er ein fastur partur av váðastýringini í grunninum. Váðabólkarnir verða eymerktir, og kapitalkravið ásett fyri hvønn bólkin. Hetta er grundarlagið undir uppgerðini av individuella solvenstørvinum. Solvensuppgerð verður latin Tryggingareftirlitinum fyri hvønn ársfjórðing.

## Inngjøld í 2000 og 2001

Sambært roknskapinum eru framvegis 1.273 tkr. í inngjøldum frá arbeiðsgevarum frá 2000 og 2001, sum ikki hevur verið møguligt at fáa eyðmerkt á ávísar persónar. Orsakað av at nevndu eftirlønargjøld eru móttikin uttan tilskilan av, hvør eigur tey, er ein ávísur vandi fyri, at grundarlagið fyri uppgerðini av eftirlønaravsetingum ikki er røtt.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum eftir leiðslurnar áskoðan hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

## Váðar og útlit fyri 2019

Sum kunnugt er tann munandi broyting hend frá og við 2012, at nú verða eftirlønir skattaðar við inngjald í staðin fyri við útgjald. Skatturin av eftirlønum er settur til 40%. Hetta merkir, at eftirlønarinngjøldini til Grunnin í sær sjálvum minka við 40%. Hinvegin skal eingin skattur svarast, tá eftirlønin verður útgoldin aftur. Sostatt er nú talan um nettoinngjald í staðin fyri bruttoinngjald framman undan. Fyri 2019 væntar grunnurin eina rímuliga gongd í netto eftirlønarinngjøldunum í mun til 2018. Hendan meting byggir á gongdina fyri byrjanina av 2019 og tær ábendingar, sum fyriliggja um virksemi og umstøðurnar í samfelagnum annars. Fleiri stór arbeiði innan byggivinnuna eru í gongd og hetta sæst aftur.

Ársúrslitið verður merkt av hvussu gongdin verður á fíggjarligu marknaðunum. Tá tað snýr seg um partabrøv, hevur byrjanin av 2019 verið góð. Fyri onnur virðisbrøv er gongdin rímuliga góð. Væntast kann, at íløgur grunsins fara at geva eitt rímuligt avkast í 2019.

Frá degnum fyri fíggjarstøðuna og til í dag eru ongar hendingar farnar fram, sum ávirka metingina fyri restina av árinum. Tó er 10-ára rentan lækkað síðani ársskiftið til áleið 0,5%. Trupult er tó at spáa um hesa gongdina. Neiliga ávirkanin á eginognina og harvið eisini grundarfæfeingið, vegna hækking í solidarisku avsetingini, er higartil umleið 2,5 mió. kr.

# Leiðslufrágreiðing

**Leiðslustørv hjá nevnd og stjórn**
Upplýsingar um onnur leiðslustørv hjá nevnd og stjórn sambært § 129a í Kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

Jan Otto S. Holm, nevndarlimur:
Stjóri, SP/F JOSH
Nevndarformaður, P/F KJ Hydraulik.
Nevndarlimur, Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelags.
Næstformaður, Landsbanki Føroya.

# Roknskaparátekning leiðslunnar

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og viðtikið ársfrásøgnina fyri 2018 fyri Eftirlønargrunn Havnar Handverkarafelags.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við ásetingarnar í lóg um tryggingarvirksemi. Vit meta, at roknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skuldum, fíggjarligu støðu 31. desember 2018 og av úrslitinum av virksemi grunsins í 2018.

Vit meta, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fram til góðkenningar á ársaðalfundinum.

Tórshavn hin 30. apríl 2019

Stjórn:

Petur Jutul Jacobsen
Stjóri

Nevnd:

Sofus Joensen
*formaður*

Eli Brimsvík
*næstformaður*

Jóhan J. Lamhauge
*nevndarlimur*

Jan Otto S. Holm
*nevndarlimur*

Dánial Páli Djurhuus
*nevndarlimur*

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

***Niðurstøða***

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Eftirlønargrunni Havnar Handverkarafelag fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir lógini um tryggingarvirksemi.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember 2018 og úrslitinum av virksemi grunsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2018 samsvarandi lógini um tryggingarvirksemi.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av grunninum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lógina um tryggingarvirksemi. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt grunnurin megnar at halda áfram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka grunnin, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

**Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum**

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grann- skoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt grunnurin megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at grunnurin ikki er førur fyri at halda áfram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

### Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi lógini um tryggingarvirksemi.

Grundað á gjørda arbeiðið er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í lógini um tryggingarvirksemi. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn hin 30. apríl 2019

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
*statsaut. revisor*

# Nýttar roknskaparreglur

## Alment

Ársfrásøgnin fyri Eftirlønargrunn Havnar Handverkarafelags er gjørd í samsvari við lógina um tryggingarvirksemi, kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum og viðtøkur grunsins.

Nýttu roknskaparreglurnar eru óbroyttar í mun til undanfarin ár.

## Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar. Útreiðslur nýttar til at røkka ársins inntøku verða tiknar við í rakstrarroknskapin.

Keyp og søla av fíggjartólum verða innroknað í fíggjarstøðuna tann dagin, handilin verður gjørdur (handilsdagin), og fíggjartólini eru innroknað, til rætturin til at móttaka/geva frá sær peningastreymar frá fíggjarligu ognini ella skylduni ikki longur er til staðar.

Fíggjartól verða í fyrsta umfari innroknað til dagsvirði. Síðani verða hesi tikin við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

## Roknskaparligar metingar

Roknskaparliga virðið á ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum av, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum

## Umroknan av fremmandum gjaldoyra

Transaktiónir í fremmandum gjaldoyra verða í fyrsta umfari umroknaðar eftir kursinum transaktiónsdagin. Gjaldoyramunir, ið íkoma millum kursin transaktiónsdagin og kursin á gjalddegnum, verða tiknir við í rakstrarroknskapinum sum ein fíggjarligur postur. Áogn, skuld og aðrar peningaligar upphæddir í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðar til kursin við roknskaparárslok. Munurin millum kursin við roknskaparárslok og dagin, tá ið áognin ella skuldin íkom, verður tikin við í rakstrinum undir fíggjarligum inntøkum og kostnaðum.

# Nýttar roknskaparreglur

## *Rakstrarroknskapurin*

### Eftirlønarinngjøld

Eftirlønarinngjøldini verða inntøkuførd so hvørt hesi verða goldin inn til grunnin. Innroknaðu inngjøldini eru aftaná frádrátt av skatti upp á 40%.

### Eftirlønarútgjøld

Eftirlønarútgjøld fevna um útgoldnar veitingar í roknskapartíðarskeiðinum.

### Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m.

Í upphæddini verða rentur og líknandi inntøkur frá lánsbrøvum, øðrum virðisbrøvum og innlánum innroknaðar umframt vinningsbýti frá partabrøvum.

Rentuinntøkur eru tíðargreinaðar til roknskaparárið, t.v.s. at roknaðar, ikki falnar rentur eru tiknar við í rakstrarroknskapin.

### Virðisjavningar

Í upphæddini verða bæði staðfestur og ikki staðfestur kursvinningur og tap innroknað, gjørt upp við støði í muninum millum tølini við árslok ella avhendan í mun til tølini við ársbyrjan ella við keyp um ognin er útvegað í árinum. Virðisjavningar umframt vinningur og tap, sum skyldast gjaldoyramunir í sambandi við umroknan til føroyskar krónur, verða eisini tikin við í hesa upphædd.

### Fyrisitingarkostnaður

Fyrisitingarkostnaður verður býttur sundur ímillum fyrisitingarkostnað av íløguvirksemi og fyrisitngarkostnað av eftirlønarvirkseminum. Fyrisitingarkostnaðurin av íløguvirksemi fevnir um kostnað fyri umsiting vm. av íløgunum.

### Flutt úrslit av íløguvirksemi

Upphæddin fevnir um tann partin av íløguavkastinum, sum hoyrir til eginognina.

### Skattur

Sambært galdandi skattalóggávu er Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags ikki skattskyldugur.

# Nýttar roknskaparreglur

## *Fíggjarstøðan*

### Aðrar fíggjarligar íløguognir

Fíggjarligar ognir (kapitalpartar, íløguprógv og lánsbrøv) verða aftaná fyrstu innrokning virðissett til dagsvirði.

Dagsvirði av børsskrásettum virðisbrøvum verður gjørt upp við støði í børsskrásetta endakursinum við roknskaparárslok.

### Eginogn

Eginognin hjá grunninum er samansett av framfluttum úrsliti og limirnir í eftirlønargrunninum eiga eginognina kollektivt.

### Ábyrgdarlán

Ábyrgdarlán grunnsins eru sett saman av upprunaliga láninum, sum grunnurin fekk frá Havnar Handverkarafelag umframt limakontum. Upphæddirnar eru innroknaðar til áljóðandi virði.

### Limakontur

Av inngjøldum í grunnin verða 90% avsett til eftirlønarskyldur og 10% fara til innskot frá limum, sonevndar limakontur. Tá eftirlønir verða útgoldnar, verður eisini goldið út av limakontum. Limakonturnar fáa tað avkast, sum tær undirliggjandi íløguognirnar hava kastað av sær, eins og tær rinda sín lutfalsliga part av umsitingarkostnaði grunnsins. Limakontur eru ein partur av grundarfæfeinginum á jøvnum føti við eginognina.

### Eftirlønaravsetingar

Eftirlønaravsetingarnar eru gjørdar upp av ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðinginum. Avsetingarnar eru gjørdar eftir tí tekniska og fíggjarliga grundarlagnum, sum er fráboðað Tryggingareftirlitinum. Eftirlønaravsetingarnar eru gjørdar upp við bestu meting fyri rentu vm., fyri samlaða virðið av teimum garanteraðu veitingunum. Munurin millum avsetingarnar, uppgjørdar eftir tekningargrundarlagnum, og virðið av teimum garanteraðu veitingunum, er bonuspotentiali fyri frípolicurnar. Hetta potentiali svarar til virði á møguligum framtíðar bonusi, treytað av at marknaðarrentan ikki broytist. Eftirlønaravsetingarnar umfata pensjónskonti og solidariska eftirløn.

# Nýttar roknskaparreglur

## Onnur skuld

Onnur skuld verður virðissett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði á skuldini.

## Lyklatøl

Lyklatølini eru gjørd við støði í reglunum í roknskaparkunngerðini um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

# Rakstrarúrslit fyri tíðarskeiðið 1. januar - 31. desember

| | Nota | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| **Eftirlønargjøld, netto** | 1 | **28.765.617** | **24.595.164** |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 2 | 7.816.167 | 6.299.710 |
| Virðisjavningar | 3 | -23.867.066 | 3.258.560 |
| Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi | | -1.124.219 | -1.032.283 |
| **Úrslit av íløguvirksemi til samans** | | **-17.175.118** | **8.525.987** |
| Útgoldnar veitingar | 4 | -6.351.124 | -5.180.171 |
| Broyting í limakontum | | -473.092 | 223.186.179 |
| Broyting í eftirlønaravsetingum | | -3.693.823 | 250.566.137 |
| **Útgoldnar veitingar og broyting í avsetingum til samans** | | **-10.518.039** | **-32.560.129** |
| Fyrisitingarkostnaður | 5 | -1.848.976 | -1.876.222 |
| **Rakstrarkostnaðir av eftirlønarvirksemi fyri egna rokning til samans** | | **-1.848.976** | **-1.876.222** |
| Flutt úrslit av íløguvirksemi | | 347.537 | -223.524 |
| **Eftirlønartekniskt úrslit** | | **-428.979** | **-1.538.725** |
| Íløguúrslit av eginognini | | -347.537 | 223.524 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **-776.516** | **-1.315.200** |
| Skattur av ársúrsliti | | 0 | 0 |
| **Ársúrslit** | | **-776.516** | **-1.315.200** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| **OGN** | | |
| **Fíggjarligar íløguognir** | | |
| Kapitalpartar | 89.171.814 | 99.896.070 |
| Íløguprógv (virkislánsbrøv) | 20.751.793 | 25.097.898 |
| Lánsbrøv | 204.531.145 | 204.470.355 |
| Innlán | 31.871.965 | 13.096.384 |
| **Fíggjarliga íløguognir til samans** | **346.326.717** | **342.560.707** |
| **OGN TIL SAMANS** | **346.326.717** | **342.560.707** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| **SKYLDUR** | | | |
| **Eginogn** | | | |
| Flutt frá undanfarnum árum | | 6.760.420 | 8.075.620 |
| Úrslit fyri tíðarskeiðið | | -776.516 | -1.315.200 |
| **Eginogn til samans** | 6 | **5.983.904** | **6.760.420** |
| **Ábyrgdarlán og limakontur** | | | |
| Ábyrgdarlán | 7 | 5.000.000 | 5.000.000 |
| Limakontur | 12,13,14 | 28.108.093 | 27.635.001 |
| **Ábyrgdarlán og limakontur til samans** | | **33.108.093** | **32.635.001** |
| Eftirlønaravsetingar, pensjónskontur | 14 | 252.972.839 | 248.715.015 |
| Eftirlønaravsetingar, solidariskar | 15,16 | 50.422.080 | 50.986.080 |
| **Eftirlønaravsetingar til samans** | | **303.394.919** | **299.701.095** |
| **Skuld** | | | |
| Ikki sundurbýttar inngjaldingar | | 1.273.186 | 1.273.186 |
| Onnur skuld | 17 | 2.566.615 | 2.191.005 |
| **Skuld til samans** | | **3.839.801** | **3.464.191** |
| **SKYLDUR TIL SAMANS** | | **346.326.717** | **342.560.707** |

Notur uttan tilvísing 8, 9, 10, 11 og 17

# Notur

## 1 Eftirlønarinngjøld, netto

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Eftirlønargjøld | 32.915.114 | 28.407.671 |
| Gjald fyri bólkatrygging | -4.149.497 | -3.812.507 |
| | **28.765.617** | **24.595.164** |

| | | |
|---|---|---|
| Eftirlønargjøldini kunnu sundurgreinast soleiðis: | | |
| Eftirlønargjøld í sambandi við starvssetan | 3.906 | 3.710 |
| Til samans (limatal) | 3.906 | 3.710 |

Øll eftirlønargjøld stava frá Føroyum.

Talan er um leypandi inngjøld og til marknaðarrentutryggingar.

## 2 Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m.

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Rentur av virðisbrøvum og innlánum | 3.348.542 | 4.198.079 |
| Vinningsbýti frá kapitalpørtum | 4.467.625 | 2.101.631 |
| | **7.816.167** | **6.299.710** |

## 3 Virðisjavningar

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Kapitalpartar | -21.238.578 | 1.730.737 |
| Íløguprógv | -1.550.580 | 398.048 |
| Lánsbrøv | -1.077.908 | 1.129.775 |
| | **-23.867.066** | **3.258.560** |

## 4 Útgoldnar veitingar

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Útgjaldingar við pensionering | 2.868.237 | 2.368.751 |
| Útgjaldingar við óarbeiðsføri/deyða | 1.238.183 | 794.004 |
| Útgjaldingar við afturkeyp | 1.638.710 | 1.484.800 |
| Leypandi útgjaldingar | 605.994 | 532.616 |
| | **6.351.124** | **5.180.171** |

# Notur

## 5 Umsitingarútreiðslur

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Umsitingarútreiðslur til samans | 2.123.976 | 2.126.222 |
| Flutt til fyrisitingarútreiðslur av íløguvirksemi | -275.000 | -250.000 |
| | **1.848.976** | **1.876.222** |

**Samsýning til grannskoðaran**

| | | |
|---|---|---|
| Grannskoðan av ársroknskapinum | 133.750 | 131.250 |
| Onnur arbeiði | 40.000 | 44.750 |
| | 173.750 | 176.000 |

## 6 Eginogn

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Eginogn 1. januar | 6.760.420 | 8.075.620 |
| Flutt úrslit fyri tíðarskeiðið | -776.516 | -1.315.200 |
| **Eginogn 31. desember** | **5.983.904** | **6.760.420** |

## 7 Ábyrgdarlán

Ábyrgdarlánið frá Havnar Handverkarafelag var rentu- og avdráttarfrítt til 31. desember 2015. Sambært avtaluni skuldi í seinasta lagi hin 31. desember 2015 verða gjørd ein avtala um, hvørt ábyrgdarlánið skal afturgjaldast og hvussu lánið skal forrentast og afturgjaldast.

Nýggj avtala varð gjørd í november 2015, sum er treytað av góðkenning frá Tryggingareftirlitinum. Sambært nýggju avtaluni skal grunnurin gjalda 1 mió.kr. aftur um árið í 2016, 2017, 2018 og 2019. Í fyrsta lagi í januar 2025 skal avtala gerast um hvørt seinasta milliónin skal gjaldast aftur. Nýggja avtalan er send Tryggingareftirlitinum til góðkenningar. Eingin peningur er goldin, og eingin góðkenning fyriliggur frá Tryggingareftirlitinum.

Við tað at Tryggingareftirlitið ikki hevur góðkent nýggju avtaluna, verður ábyrgdarlánið í síni heild roknað við í uppgerðini av grundarfæfeingi grunsins.

Havnar Handverkarafelag hevur í sambandi við ársfrásøgnina fyri 2018 váttað, at ábyrgdarlánið í fyrsta lagi skal rindast aftur eftir árslok 2023.

# Notur

## 8 Starvsfólkakostnaður

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Lønir | 1.080.316 | 883.038 |
| Eftirlønir | 141.277 | 127.251 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 50.403 | 37.953 |
| Aðrir starvsfólkakostnaðir | 51.676 | 44.558 |
| | **1.323.672** | **1.092.800** |
| Samsýning til stjórn | 497.516 | 513.188 |
| Samsýning til nevnd | 484.529 | 479.318 |
| Miðaltal av starvsfólkum | 2,0 | 1,0 |

**Upplýsingar sambært § 61 c, stk. 3 í tryggingarlógini**

| | A-inntøka | Eftirløn |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| **Stjórn** | | |
| Petur Juul Jacobsen | 434.178 | 63.338 |
| **Samsýning til stjórn til samans** | **434.178** | **63.338** |
| **Nevnd** | | |
| Sofus Joensen, formaður | 213.789 | 31.714 |
| Marita í Brekkunum, næstformaður (til 13. desember 2018) | 59.133 | 0 |
| Jan Otto S. Holm (frá 13. desember 2018) | 2.169 | 325 |
| Jóhan J. Lamhauge | 51.420 | 7.713 |
| Eli Brimsvík, næstformaður (frá 13. desember 2018) | 51.420 | 7.713 |
| Dánial Pauli Djurhuus | 51.420 | 7.713 |
| **Samsýning til nevnd til samans** | **429.351** | **55.178** |

# Notur

## 9 Íløguognir og teirra avkast

| | Roknskaparligt virði | | Netto-íløga í árinum | Avkast í % p.a. áðrenn skatt |
|---|---|---|---|---|
| | Við ársbyrjan | Við árslok | | |
| | | | | |
| Grundøki og bygningar | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Grundøki og bygningar til samans** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| Børsskrásettir føroyskir kapitalpartar | 7.420 | 7.595 | 0 | 2% |
| Ikki skrásettir føroyskir kapitalpartar | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Skrásettir útlendskir kapitalpartar | 98.726.150 | 88.546.958 | 0 | -14% |
| Ikki skrásettir útlendskir kapitalpartar | 1.162.500 | 617.261 | 412.500 | -60% |
| **Aðrir kapitalpartar til samans** | **99.896.070** | **89.171.816** | **412.500** | |
| Stats-lánsbrøv (zone A) | 44.385.232 | 11.771.002 | 0 | 1% |
| Realkredit-lánsbrøv | 158.109.332 | 187.399.030 | 0 | 1% |
| Indeks-lánsbrøv | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kreditobligationer investment grade | 2.075.610 | 972.847 | 0 | 1% |
| Kreditobligationer non investment grade samt emerging markets obligationer | 24.998.079 | 25.140.058 | 0 | -2% |
| Onnur lánsbrøv | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Lánsbrøv til samans** | **229.568.253** | **225.282.938** | **0** | |
| Útlán tryggjað við veð | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Aðrar fíggjarligar íløguognir | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Avleidd fíggjarlig tól til tryggjan av nettobroytingum í ognum og skyldum | 0 | 0 | 0 | 0 |

# Notur

## 10 Býti av kapitalpørtum á vinnugreinar og øki

| | Føroyar | Restin av Europa | Norður-amerika | Suður-amerika | Japan | Restin av Fjar-eystri | Onnur lond | Ikki út-greinað | **Til samans** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Orka | 0,0% | 2,4% | 0,8% | 0,1% | 0,0% | 0,3% | 0,1% | 0,0% | **3,6%** |
| Tilfar | 0,0% | 2,7% | 0,9% | 0,1% | 0,1% | 0,5% | 0,1% | 0,0% | **4,5%** |
| Ídnaður | 0,0% | 7,5% | 3,1% | 0,2% | 0,5% | 0,6% | 0,0% | 0,0% | **12,0%** |
| Nýtsluvørur | 0,0% | 4,3% | 3,6% | 0,1% | 0,9% | 1,4% | 0,1% | 0,0% | **10,5%** |
| Brúksvørur | 0,0% | 4,6% | 1,7% | 0,2% | 0,2% | 0,3% | 0,1% | 0,0% | **7,1%** |
| Heilsuviðgerð | 0,0% | 7,5% | 4,3% | 0,0% | 0,2% | 0,2% | 0,0% | 0,0% | **12,2%** |
| Fígging | 0,0% | 10,6% | 6,8% | 0,4% | 0,4% | 2,5% | 0,6% | 0,0% | **21,3%** |
| KT | 0,0% | 2,1% | 9,3% | 0,0% | 0,5% | 2,4% | 0,3% | 0,0% | **14,7%** |
| Fjarskifti | 0,0% | 3,0% | 3,3% | 0,1% | 0,3% | 0,7% | 0,1% | 0,0% | **7,4%** |
| Veitingar | 0,0% | 1,1% | 0,6% | 0,1% | 0,0% | 0,1% | 0,0% | 0,0% | **1,9%** |
| Ikki útgreinað | 0,0% | 1,2% | 0,6% | 0,2% | 0,2% | 2,0% | 0,7% | 0,0% | **4,8%** |
| **Til samans** | **0,0%** | **47,0%** | **35,1%** | **1,4%** | **3,4%** | **11,1%** | **2,1%** | **0,0%** | **100,0%** |

# Notur

## 11 Viðkvæmisupplýsingar (1.000 kr.)

| Hending | Minsta ávirkan á basiskapitalin | Størsta ávirkan á "kollektivar bonus-møguleikar | Størsta ávirkan á bonusmøguleikar fyri frípolicu-veitingar áðrenn broytingar í nýttum bonus-møguleikum fyri frípolicu-veitingar | Størsta ávirkan á nýttum bonus-møguleikum fyri frípolicu-veitingar |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| Rentuhækking upp á 0,7%-stig | 6.190 | 0 | 6.190 | 0 |
| **Rentulækking upp á 0,7%-stig** | **-7.423** | **0** | **0** | **0** |
| Fall í partabrævakursinum upp á 12% | -10.700 | 0 | 0 | 0 |
| Fall í virðinum av fastari ogn upp á 8% | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Gjaldoyraváði (VaR 99,5%) | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tap upp á mótpartar 8% | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Fall í "deyðatali" upp á 10% | 0 | 0 | -831 | 0 |
| Hækking í "deyðatali" upp á 10% | 0 | 0 | 753 | 0 |
| Hækking í "óarbeiðsføristali" upp á 10% | 0 | 0 | 0 | 0 |

# Notur

## 12 Solvensmargin og grundarfæfeingi

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Solvensmargin | 27.629.010 | 26.057.000 |
| Grundarfæfeingi | 39.091.997 | 39.395.421 |

## 13 Grundarfæfeingi og eginogn

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Grundarfæfeingi | 39.091.997 | 39.395.421 |
| Egingon | 5.983.904 | 6.760.420 |
| **Munur** | **33.108.093** | **32.635.001** |
| Sum er: | | |
| Ábyrgdarlán | 5.000.000 | 5.000.000 |
| Limakontur | 28.108.093 | 27.635.001 |
| | **33.108.093** | **32.635.001** |

# Notur

## 14 Pensjóns- og limakontur

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Salda við ársbyrjan | 276.350.016 | 250.821.180 |
| Inngjøld í árinum | 32.915.114 | 28.407.671 |
| Umsitingargjøld | -1.865.635 | -1.906.104 |
| Útgjøld vm. í árinum | -5.289.388 | -4.662.812 |
| Rentutilskriving í árinum | -16.879.678 | 7.502.588 |
| Tryggingargjøld | -4.149.497 | -3.812.507 |
| Salda við árslok | **281.080.932** | **276.350.016** |

**Býti:**

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Pensjónskontur | 252.972.839 | 248.715.016 |
| Limakontur | 28.108.093 | 27.635.001 |
| Limakontur í % | 10% | 10% |

## 15 Eftirlønir, solidariskar (marknaðarpartur)

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Salda við ársbyrjan | 50.986.080 | 49.134.959 |
| Inngjøld | 0 | 0 |
| Útgjøld | -1.061.736 | -517.359 |
| Rentutilskriving | 805.850 | 801.480 |
| Styrking | -365.114 | 1.476.000 |
| Váði | 57.000 | 91.000 |
| Salda við árslok | **50.422.080** | **50.986.080** |

Sum trygd fyri samlaðu eftirlønarskyldunum, eru ognir fyri 324,8 mió. kr. skrásettar.

# Notur

## 16 Eftirlønir, solidariskar (retrospektivar)

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Salda við ársbyrjan | 40.823.372 | 39.922.437 |
| Styrking | -198.498 | 900.935 |
| Salda við árslok | **40.624.874** | **40.823.372** |

## 17 Nærstandandi partar
**Havnar Handverkarafelag**

**Transaktiónir við nærstandandi partar**

Grunnurin hevur felags umsiting við Havnar Handverkarafelag. Hetta umfatar m.a. KT og hølir v.m. Kostnaðurin verður býttur millum Havnar Handverkarafelag og grunnin sambært avtalu um umsiting. Starvsfólkini er ikki umfatað av avtaluni.

Av upphæddini onnur skuld, er skuldin til Havnar Handverkarafelag umleið 2,3 mió. kr.